# Dreingjadreymar á Hálsi

**Eitt fet nærri dreingjadreyminum Tað gongur støðugt framá við ætlanini hjá RC- felagnum í Klaksvík um at gera eitt rættiligt frítíðarøki uppi á Hálsi. Leygardagin komu teir dreyminum eitt fet nærri, tá vegurin til tjørnina varð liðugur**

KLAKSVÍK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Leygarmorgunin fóru limir í RC-felagnum í Klaksvík í holt við at gera vegastrekki inn til tjørnina uppi á Hálsi*

Seinasta leygarmorgun fóru eini 15 mans úr RC-felagnum í Klaksvík til arbeiðis uppi á Hálsi. Uppgávan var, at gera ein 100 metur langan vegastubba frá parkeringsøkinum og inn til tjørnina, sum teir gjørdu har seinasta heyst. Higartil hava limirnir í RC-felagnum verið noyddir at ganga hetta strekkið gjøgnum hagalendi fyri at koma til tjørnina við sínum modellskipum. Og hóast teinurin ikki er langur, kann hann kennast ólagaligur við nógvum viðføri. Tí avgjørdi felagið longu síðsta vetur, at gera ein vegastubba á strekkinum, so tað verður lættari hjá teimum, serliga tá tey stóru modellini skulu flotast á tjørnini.

Og leygarkvøldið klokkan 23 var vegastubbin so liðugur. Tá høvdu sjálvbodnu limirnir úr RC-felagnum koyrt umleið 70 less av ífyllugróti, meðan ein broytførari hevði grivið av. Nú er so klárt at asfaltera og annars hampa vegin, men ætlanin er ikki at gera parkeringspláss við tjørnina. Heldur verður verandi parkeringaspláss haruppi víðka, so limirnir í felagnum og vitjandi fáa betri møguleikar at seta bilin frá sær har.

## »Café Kaffikráin«

Tjørnin uppi á Hálsi er liður í eini størri ætlan hjá RC-felagnum um at gera økið til eitt rættiligt RC-umhvørvi, har limirnir fáa møguleika at royna sínar ymsu leikur, meðan onnur eisini fáa høvi at síggja ymiskt av tí sum felagið tekst við. Í løtuni eru teir í holt við at drena øki omanfyri tjørnina, so tað kann gerast til ein flogvøll til modellflogførini og niðanfyri verður seinni ein koyribreyt gjørd til fjarstýrdu bilarnar. Limirnir vóna, at hetta økið uppi á Hálsi sum frá líður kann gerast eitt hugnaligt frítíðarpláss, har vitjandi og ferðafólk samstundis kunnu sita og njóta tað vøkru náttúruna og tað frálíka útsýni og kanska enntá sleppa at keypa sær ein kaffimunn og ein køkubita.

– Men vit hava ongar ætlanir um at byggja nakra kaffistovu heruppi. Her eru einar tríggjar niðurdottnar kráir beint við, og tað kann væl hugsast at vit fara at laða onkra av teimum uppaftur, so hon kann brúkast sum kaffikrógv. Umstøðurnar her eru so vakrar, sum vit kunnu ynskja okkum. Og verður tað upp til okkum, skal náttúran her órógvast so lítið sum yvirhøvur til ber, siga limir í RC-felagnum.

## Stórir dreingir – dýrar leikur

Limirnir í RC-felagnum hava ikki so nógv ímóti at viðganga, at endamálið við økininum uppi á Hálsi eisini er at gera ein dreingjadreym til veruleika og at sleppa at vísa sínar leikur og reypa eitt sindur fyri øðrum og hvørjumøðrum.

– Í grundini eru vit bara stórir smádreingir, sum hava fingið ráð til eitt sindur dýrari leikur, enn vit høvdu, tá vit vóru yngri. Tað einasta, sum krevst afturat, er eitt barnsligt lyndi og stórur áhugi fyri øllum tøkniligum, sigur ein av teimum.

Men ein rættur RC-limur má helst eisini hava gott tol og vera fittur í hondunum. Tað tekur til dømis ofta upp til tvey ár at byggja eitt neyvt modell av einum trolara í støddini 1 til 50, men tá líkist hann eisini niður í minsta smálut.

Um konufólk eisini sita og putlast við slíkt í loyndum, vita teir í RC-felagnum ikki, men enn hevur onki konufólk tekna seg sum lim. Hinvegin hava tær verið framúr dugnaligar at baka køkur og gera kaffi, tá okkurt tiltak hevur verið á skránni, og har hætta stóru smádreingirnir sær ikki at taka kappingina upp.

## Sjálvboðið arbeiðið

RC-felagið í Klaksvík hevur einar 40 limir, og alt arbeiðið, sum er gjørt higartil uppi á Hálsi, hava limir í felagnum gjørt sjálvbodnir. Men alt hetta hevði neyvan borið til uttan stóru vælvildina, bæði privatir og almennir stovnar hava sýnt ætlanini, og tað hevur gjørt arbeiðið sera hugaligt. Og meðan limirinr í felagnaum fegnast um hjálpina teir hava fingið frá Klaksvíkar Kommunu, vóna teir eisini at Kommunan nú fer at sýna sjálvum vegnum niðan á Háls størri áhuga. Vegurin er illa farin og er ofta til stóran ampa fyr øll tey mongu sum dagliga ganga túr har. Nú vakra økið hjá RC-felagnum er við at gerast veruleiki, kann tað jú væl hugsast, at tað fer at gerast meir áhugavert hjá ferðafólki eisini. Men sum vegurin nú sær út, er tað ikki so løgi, um onkur ikki hættar sær at byrja túrin niðaneftir.




*Klokkan 23 leygarkvøldið kundu sjálvbodnu arbeiðsmenninir úr RC-felagnum hvíla seg og frøast um lidna arbeiðið*



## Krabbagágga í egnum landi:

*Myndir: Høgni Heinesen*

*Krabbagoggurutan:*





*Krabbagággan og matmóðurin í Æðuvík, Katrina Hansen*










*Ein biti av royktum laksi í Runavík*



# Leitanin eftir Bygdaleiðum

***Krabbagággan skrivar:***

Ból & Biti er føroyska heitið fyri Bed & Breakfast, og her verður, sum heitið sjálvt sigur, veitt song og morgunmatur. Hesin gistingarmøguleiki er ofta ein millumloysn fyri tey ferðandi, ið ikki vilja búgva á bíligasta hátt á vallaraheimi, men heldur ikki vilja gjalda tað, sum eitt hotel kostar. Hesin gistingarháttur er eisini ógvuliga væl umtóktur millum tey, sum gjarna vilja koma í samband við lokalfólkið, tí ofta er Ból & Biti at finna í privatum húsum, har húsfólkið leigar eitt ella fleiri kømur út um summarið.

Tey, sum hava roynt hendan gistingarháttin á ferðum uttan fyri Føroyar, vita, at dygdin á bæði song og morgunmati kann svinga nógv frá einum Bóli & Bita til tann næsta. Ból & Biti í Æðuvík kostar 175 krónur fyri hvønn. Tað má sigast at vera bíligt, og tí er tað heldur ikki við nøkrum vónum um eitt stórt kulinariskt upplivilsi at eg vakni í Æðuvík og fari niðurundir at fáa mær morgunmat.

Men í stovuni bíðar eitt óvanliga væl dekkað borð. Her er einki eftir til smakkisansin at ynskja sær, og sjónin fær eisini sítt. Heimabakað franskbreyð, heimagjørd smyrjibreyð, bleyttkókað egg, frukt, kaka, tvey sløg av djús, tvey sløg av jogurt, fyri nú at nevna ein part av tí, sum er sett fram fyri okkum. Eg havi sæð morgunmatar á nógvum trý-stjørnaðum hotellum, sum ikki koma upp á knøini á hesum.

– Morgunmatur er tað einasta, sum er við í prísinum, so hann skal vera góður. Ofta eru tað krabbagággur, sum búgva her og tær skulu hava nokk at eta, tí eingin veit nær tær fáa nakað etandi aftur, sigur matmóðirin Katrina Hansen, tá eg spyrji, um hetta veruliga er vanligi morgunmaturin.

Hesum síðsta kann hon hava rætt í. Eingin veit nær vit fáa mat aftur. Eingin bussur hjá Bygdaleiðum fer úr Æðuvík hendan dagin, og óvist er hvussu langt man vera millum bilarnar, um man stillar seg at tumla. So vit ganga.

Vit pakka ryggsekkin, biðja matmóðrini farvæl og takk, og fara so avstað við kós ímóti Nesi, tí her skulu vit lata tráðuna aftur, sum vit læntu í gjár frá manninum, sum sleppur sílum í Nesvatn.

Tað er lætt at finna inn á gomlu varðagøtuna heim á Nes, tí skeltir í bygdini vísa vegin. Men komin út um bøgarðin hómast eingin varði. Vit ganga tí eftir meira modernaðu varðunum, el-pelunum, og koma harvið fram á fyrsta varðan. Tað er tjúkt í mjørka, men varðarnir tæna sínum endamáli væl. Vindmyllan sendir sínar ljóðbylgjur ímóti okkum, men vit síggja hana ikki.

Skjótt koma húsini á Nesi undan kavi. Onkrastaðni her skuldi sílamaðurin búð. Eg fái uppspurt, at hann býr í hinum endanum á bygdini, so vit venda nøsini tann vegin.

Sambært mínari Lonely Planet bók eru tvey ting at síggja á Nesi. Kirkjan frá 1843 við taki úr fløgugróti, og ein kanón, sum varð brúkt at verja innsiglingina til Skálafjørðin undir seinna veraldarbardaga. Kirkjan er stongd, men takið sær man so. Kanónin stendur í einum gomlum áhugaverdum bunkarakompleksi, har tað rættiliga ber til at merkja søgunnar veingjasuð. Í økinum rundanum eru eisini nøkur rættiliga sermerkt hús, sum í síni tíð vórðu bygd omaná bunkarunum.

Sílamaðurin vísir seg at búgva í allar uttastu húsunum í allar ovasta býlinginum á Nesi, og tað regnar. Man má taka tað súra við tí søta, hugsi eg, meðan eg gangi niðan við tráðuni. Her er einki hóvasták við undirskriftum og depositum fyri tráðuna. Her hevur man álit á, at ferðafólk koma aftur við tí, sum tey hava lænt, og eg stilli bara tráðuna í túninum, tí sílamaðurin er ikki inni.

Frá uttastu húsunum í ovastu býlinginum gongur leiðin nú til gongu til næstu bygd, Toftir, at fanga ein buss hjá bygdaleiðum. Vit ganga framvið flottu, men nakað køldu, Fríðrikskirkjuni oman í downtown Toftir. Eftir at hava leita eftir buss steðgiplássinum nóg leingi til onga nyttu, spyrji eg ein av teimum lokalu.

– Tit standa beint á tí. Tað er ikki so lætt at finna, tí her er einki skýli, fái eg at vita.

Flott klárað. Ikki so mikið sum eitt lítið skelti er sett upp fyri at markera, at her steðgar bussurin. Av góðum grundum ber heldur ikki til at síggja nær bussurin kann væntast at koma framvið Toftum aftur, men eg havi fyrireikað meg og keypt eina ferðaætlan á Farstøðini í Havn. Sambært henni kemur bussurin um hálvan annan tíma.

Uttan at geva okkum far um hvussu langt tað í veruleikanum er til Runavíkar, fara vit til gongu eftir vegnum móti grannabygdini. Lítlan tíma seinni koma vit til downtown Runavík, og her er lív. Tey lokalu flokkast um ein fiskamarknað og ein loppumarknað og sum eitt søluframtak fyri føroyskan laks, verða øll boðin at fáa sær ein bita av royktum laksi.

Eg havi ikki etið síðan í morgun, og fylli glaður í holið. Tað smakkar væl, men slær ikki hvítleyksstokta maðkapirru al fresco og smyrjibreyðini á morgunmatarborðinum í Æðuvík.

Her frá marknaðinum hómast eitt blátt buss skýli . Einki skelti sigur frá um nakar bussur yvirhøvur steðgar her, ella nær tað kann hugsast at henda. Men um ikki annað er skýlið ein ábending um at Bygdaleiðir finnast, og her fær man sitið turrur.